# MIÐLAHÚSIÐ Í VÁGSBOTNI Á ÓLAVSØKU

Dyrnar verða latnar upp í Miðlahúsinum í Vágsbotni á ólavsøku. Skipað verður fyri fleiri ymsum tiltøkum umframt at høvi verður at síggja hetta nýggja føroyska miðlahúsið.



## LIVEKONSERT við SIGRIÐ RASMUSSEN

Entré til konsertina er 70 kr.

Ólavsøkuaftan, hósdagin 28. juli kl. 22.30 og aftur ólavsøkudag, fríggjadagin 29. juli kl. 22.30 fer sangkvinnan Sigrið Rasmussen úr Havn at syngja og spæla saman við Gunnar Guttesen, piano og Rúni Eysturlíð, guitar.



## FRAMSÝNING VIÐ SKEMTITEKNINGUM HJÁ ÓLA P

Letur upp mikudagin 27. juli kl. 14.00
Teknarin verður sjálvur til steðar og signerar Skemtbøkur
Framsýningin er opin til og við sunnudagin,
allar dagar frá kl. 14.00 til 20.00.

Entré 30 kr.

## ÚTGÁVUKONSERT VIÐ BREKKUBROTHERS



Ólavsøkudag, fríggjadagin kl. 17 verður útgávukonsert við Brekkubrothers.

## 40 ÁRA GAMAL BBC FILMUR UM FØROYAR

Kendi føroyski fotografurin Jákup Andreas Arge hevur við hjálp frá John Rajani á føroysku sendistovuni í London fingið fatur í einum forvitnisligum filmi um Føroyar, sum Douglas Ficher tók upp fyri BBC í 1968. Filmurin hevur ongantið verið vístur í Føroyum áður. Hann verður sýndur í Miðlahúsinum ólavsøkudagarnar.

Eisini annar tónleikur verður í Miðlahúsinum um ólavsøkuna. Eitt nú fara Spælimenninir at spæla.